# Stovna nýtt dansifelag

**Føroyski dansurin hevur tað gott, og nógv dansifeløg eru virkin kring landið. Týskvøldið fara fólk á Eiði at stovna enn eitt dansifelag**

FØROYSKUR DANSUR
*Edvard Joensen*

Fólk, sum í einar fimm vetrar hava dansað í Látrahúsinum á Eiði, fara týskvøldið at stovna dansifelag. Stovnandi aðalfundurin veðrur á Látrinum klokkan 20.00.

Hóast dansað hevur verið regluliga hesar vetrarnar, hevur einki veruligt felag verið. Bert ein áhugabólkur, sum tey nevna tað.

Við at stovna felag vænta dansifólkini at fáa ymsar fyrimunir, tá hugsað verður um tiltøk av ymsum slag, sum tey annars plaga at luttaka í. Møguleiki verður fyri at gerast limur í landsdansifelagnum Sláið Ring, sum so aftur gevur nógvar ymsar fyrimunir. Serliga verður hugsað um fíggjarliga fyrimunir, sum fáast kunnu, um eitt nú verður søkt um stuðul til eitthvørt ávíst tiltak, sum landsfelagið kann hjálpa til við.

Eitt annað er, siga tey, sum nú taka stig til at stovna felagið, at í einum áhugabólki eru viðurskiftini eitt sindur leysari, tá eingin er, sum formelt hevur ábyrgdina av tí, sum fyriferst.

Væl hevur tað gingið fínt hesi árini, men nú er tað komið har til, at fólk halda tíð vera at stovna felagið og fáa lut í teimum møguleikum, eitt slíkt felag gevur.

Eitt, sum tosað hevur verið um hesi árini, dansað hevur verið á Látrinum, er at fáa fólk úr eitt nú grannabygdunum uppí. Tað hevur tókst eitt sindur strilti, tí fólk hava líkasum hildið seg aftur, skilst, um tey einki ættarligt samband hava til Eiðis.

Tað er nevniliga so, at dansað hevur verið í hølunum hjá Eiðis Fornminnisfelag, og tí hevur tað mestsum ligið í luftini, at tað eru eiðisfólk og tey, sum tilknýti hava til Eiðis, sum koma har.

Men soleiðis hevur ongantíð verið meiningin, at tað skuldi vera. Og nú felag verður stovnað, og fólk gjalda beinleiðis limagjald, vóna fyrireikararnir, at tað kann fáa fólk at koma við, tá tey kenna, at hetta eisini er teirra, um tey annara einki samband hava tann vegin uttan dansin.

Føroyski dansurin á Latrinum byrjaði, tá Eiðis Fornminnisfelag, sum hevði keypt Látralonina, hevði sett húsið í stand. Hildið varð, at húsið eisini skuldi brúkast regluliga til annað enn bygdarsavn, og varð tí boðið fólki, sum hevði hug at dansa, at taka saman í húsinum. Hetta hevur so verið gjørt hvørt týskvøld hesar seinastu vetrarnar. Byrjað verður vanliga umleið mánaðarskiftið september/oktober, og hildið verður á til føstulávint. Eini 40 fólk hava verið virkin í dansibólkinum. Umleið 15-20 plaga at møta hvørt kvøldið.

Nú stig verður tikið til at stovna eitt rættiligt dansifelag, vænta og vóna tey, at enn fleiri fara at koma í dans á Látrinum týskvøld klokkan 20.00.



*Dansifókini á Látrinum fara týskvøldið at stovna felg og vóna at fáa avbygdafólk uppí*

**Føroya størsta úrval av pakkitilfari úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir**

**Vit útvega eisini:**
Plastbakkar • Pakkibond • Tape • Merkir • Etikettir
Knívar • Kitlar • Húgvur • Handskar • Svintur
Ymisk tól til ídnaðin • Reingerðisevni • Íbindingarevni
Plattar • Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

... sjálvandi til besta prísin !!

FARPACK
Staravegur 5 • P.O. Box 3099 • 110 Tórshavn • Faroe Islands
Telefon 35 30 00 • Fax 35 30 10 • e-mail: farpack@farpack.com
www.farpack.com

Sosialurin -har tað hendir

TMJunior letur upp



Mikudagin 19.09. kl. 9.00

Við væl umtokta danska merkinum Miller Junior og tí kenda týska merkinum Tom Tailor

TOM TAILOR JUNIOR / GIRLS
MILLER JUNIOR



lata vit dyrnar upp til ein spennandi handil til gentur og dreingir upp til 16 ár

Sjálvandi hava vit nógv góð upplatingartilboð

Eisini fara vit at luta burtur, eina Mountain Bike, eitt løbehjul og eitt gávukort



Kom inn í handilin og hoyr hvussu. Drigið verður langan leygardag kl. 13.00

TMJunior Vælkomin
Dr. Jacobsensgøta 15
Tlf 311099
( við síðurnar av Lampubúðini og Skálabúðini )



# Skjóta seismikk av nýggjum

**Seismikkskjótingin á Leirvíksfirði í summar miseydnaðist. Roynt veðrur aftur um mánaðarskiftið oktober/ november**

UNDIRSJÓVARTUNNIL
*Edvard Joensen*

Seismikkroyndirnar í samband við undirsjóvartunnilin undir Leirvíksfirði, sum gjørdar vórðu av einum norksum felag í summar, miseydnaðust. Nú fer annað felag at gera nýggjar royndir.

Óli Petersen, hjá Landsverkfrøðinginum, sigur, at Landsverkfrøðingurin hevur gjørt avtalu við eitt annað norskt felag, sum skal gera royndirnar í heyst.

Tá farið varð undir skjótingina í summar, vóru tvey feløg, sum veljast kundi ímillum. Tað felagið, sum fekk arbeiðið og hetta felagið, sum nú fer at royna. At hetta seinna felagið ikki varð valt tá, komst av, sigur Óli Petersen, at teir høvdu so mikið nógv at gera, at ikki vóru stundir til at skjóta í Føroyum tá. Tí varð hitt felagið valt. Men tað var einki heppið val, kann sigast nú aftaná.




Nú verður roynt av nýggjum, og vónir eru fyri, at tað kann gerast í tveimum streymloysum, sum liggja báðu megin mánaðarskiftið.

Um so verður, at tað eydnast, væntar Óli Petersen, at analysurnar av seismikkinum vera lidnar um ársskiftið.

Ymiskt er, sum skal fáast upp á pláss, áðrenn hugsast kann um at gera endaliga av, hvar ein undirsjóvartunnil undir Leirvíksfirði skal liggja, sigur hann.

Geologiskar kanningar hava bent á, at tann syðra leiðin, sum hevur verið upp á tal, kanska ikki er so góð, tí har eru gjáir á vegnum. Møguleiki er fyri, at tunnilin kemur at liggja fram við eini gjógv, og tað er mestum ein vanlukka, sigur Óli Petersen. Skal ein gjógv vera fyri, er av illum frægast at koma vinkulrætt inn á hana, so tað slepst sum skjótast frá henni aftur.

At gjáir møguliga eru á vegnum ger, at helst verður farið longur norður á fjørðin við tunnlinum. Eitt sindur norður um Hagaleiti verður tosað um. Men hetta eru so ting, sum nú skulu fáast upp á pláss, áðrenn nøkur sum helst averð verður tikin.

Annars sigur Óli Petersen, at teir hava gjørt royndarboringar uppi á landi Leirvíksmegin, har borað er niður í undirgrundina. Seinni verður borað Klaksvíksmegin á leið har, munnin ta megin verður.

Úrslitið av boriroyndunum, sum gjørdar eru, hava verið í lagi, sigur Óli Petersen á Landsverkfrøðingsskrivstovuni.

# Postverkið ger skundisliga avtalu

**Postverk Føroya hevur gjørt samstarvsavtalu við flutningsfelagið DHL, sum arbeiðir burturav við skundflutningi**

FLUTNINGUR

Postverk Føroya hevur gjørt samstarvsavtalu við skundflutningsfelagið (express) DHL um flutning av pakkum, brøvum og øðrum, sum skal flytast skjótt.

Samstarvið millum feløgini bæði byrjaði tann 1. august í ár, sigur Postverk Føroya í tíðindaskrivi, sum sent varð við postinum um dagarnar.

Umframt at fólk nú kunnu keypa hesar skundflutningstænastur á øllum teimum størru posthúsunum í Føroyum, ber eisini til at fylgja teimum á internetinum, sigur Postverkið í tíðindaskrivinum. Sum er ber til at fara inn á heimasíðuna hjá DHL, sum eitur www.dhl.com

Men seinni kann hetta eisini gerast á heimasíðuni hjá Postverki Føroya, sum eitur www.post.fo

Hetta er ikki hvør sum helst, sum Postverkið nú er farið at samstarva við. DHL hevur millum annað samstarv við fleiri almenn postverk í heiminum. Alt úr Grønlandi og Finnlandi til Ný Sælands. Og tað starvast 70.000 fólk í 220 londum hjá hesi fyritøkuni.

Tað er ikki bara fyri at fáa eitt bræv skjótari úr almennum stýrum í Havn norður á Trøllanes, at Postverk Føroya ger slíka avtalu, hóast tað eisini kann hjálpa til har.

Avtalan er í størri mun ætlað at veita føroyskum kundum, bæði privatum og vinnuligum, betri og skjótari altjóða tænastu.

Við hesi avtaluni hevur Postverk Føroya givið kundum sínum eina tænastu, sum livir upp til øll tey krøv, vinnulívið setir til skundflutning, endar Bergur í Garði, postverksstjóri, tíðindaskrivið.



*Postverkið og DHL fara at skunda sær at fáa føroyskar sendingar út í heim*

**Landsfundur Javnaðarfloksins í Vestmanna 14. og 15. september**